


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Fólk við skerdum førleika somu rættindi



Val X

ANN ELISABETH JOENSEN
Javnaðarflokkurin

Arbeiði er týdningarmikið í fatanini og sjálvsfatanini hjá fólki, tí skulu fólk ikki haldast uttanfyri arbeiðslívið.

Allir føroyingar skulu hava somu rættindi, skyldur og møguleikar óansæð eyðkenni ella frábregði. Vit skulu fyribyrgja og beina burtur mismun á arbeiðsmarknaðinum, bústaðarmarknaðinum, skúlum og almenna rúminum.

Vit hava øll hvør sær dygdir og førleikar, og júst tí er tað brúk fyri okkum øllum.

Arbeiðgevarar skulu stuðlast í at gera trygg arbeiðspláss og at rúma teimum, ið ikki eru fult arbeiðsfør. Neyðugt er við smidligum skipanum, sum samstundis veita sosialan tryggleika. Forðingar skulu beinast av vegnum. Tað skal gerast møguligt hjá teimum við skerdum førleika at koma í arbeiði, og tað skal gerast truplari at halda teimum uttanfyri arbeiðsmarknaðin.

Vit skulu tryggja fólk við skerdum førleika møguleikar á arbeiðsmarknaðinum.

Tað snýr seg um ikki bert um arbeiðsmarknaðin, men eisini um íbúðarviðurskifti, atgongd til almennar bygningar og almennan flutning. Ein treyt fyri at kunna luttaka í samfelagsviðurskiftum er, at allar fysiskar forðingar verða beindar burtur.

Hvørt einstakt menniskja eigur at verða virt sum myndugt og sjálvstøðugt menniskja og hava rætt til útbúgving, arbeiði og eitt sosialt lív.

Tað kann ikki góðtakast, at fólk við skerdum førleika ikki hava somu rættindi sum aðrir borgarar í samfelagnum.

Javnaðarflokkurin leggur dent á, at arbeiðsmarknaðurin skal rúma øllum.

# Virðini verja okkum!



Val X

BILL JUSTINUSSEN
Miðflokkurin

Í einum støðugt broytandi og samanknýttum heimi er neyðugt at hava eitt trygt og haldgott grundarlag. Sum tjóð er okkara avbjóðing at viðurkenna tann góða grundvøll, ið vit standa á, í tíðum við skiftandi rákum.

Fleiri politikarar og samfelagsgranskarar hava ført fram, at so hvørt sum eitt samfelag verður moderniserað, verður ávirkanin av kristnitrúnni/átrúnaði alsamt minni. Henda fatan tykist at fána burtur, tí menniskju koma til ta niðurstøðu, at menniskju liva ikki av breyði eina. Menniskjað er ikki einans ein likamlig vera. Menniskjað hevur ein sálarligan og ein likamligan part, og hesar síður av menniskjanum kunnu ikki undirmetast. Miðflokkurin sær menniskjuna sum eina heild, og tí er spurningurin um vælferð ikki einans ein spurningur um at hava gott arbeiði, góða eftirløn, ráð at rinda rokningarnar, bil og fíggjarligt frælsi til at ferðast út í heim. Alt hetta er gott og ynskiligt, men Miðflokkurin setir alt menniskjað í miðdepilin. Tí arbeiðir Miðflokkurin miðvist og áhaldandi móti eini heildarvælferð, har politikkurin er grundaður á umsorgan fyri tí mentanarliga og andaliga arvinum, sum í øldir hava ríkað og signað okkara land og fólk.

Mentan er tann samansetta heildin av siðalæru, virðum og normum, sum ein einstaklingur ognar sær sum ein partur av einum samfelagi. Tann føroyska mentanin er fjølbroytt og kann vera trupul at allýsa. Tó er tað einki dulsmál, at tann kristna trúgvin hevur ein serligan leiklut í okkara samfelagi, og skapar og myndar hon mentanina í Føroyum. Hvussu hevði tann føroyska mentanin sæð út, um tann kristna trúgvin ikki hevði havt so stóran týdning, sum hon hevur? At geva eitt endaligt svar er ikki møguligt, men lætt er at staðfesta, at kristnitrúgvin hevur verið, og er, eitt haldgott grundarlag og er ein kelda til íblástur á mongum samfelagsøkjum. Uttan tey kristnu virðini høvdu Føroyar verið ein fátøk tjóð. Menniskjavirði, næstakærleiki, samkensla, umsorgan fyri teimum veiku, eggjan til at brúka eins egnu førleikar, arbeiðssemi, vónartilgongd til lívið, fyrigeving, familjan sum kjarnueind, frælsi, rættvísi og rættartrygd eru einans nøkur av teimum kristnu virðunum, sum eg vil stríðast fyri. Hetta er partur av mínum tilverugrundarlagi sum politikari. Hesi virði eru natúrligur partur av okkara mentan og hava tey alstóran týdning fyri allar føroyingar, tí hesi virði verja okkum. Tey verja okkum t.d. ímóti:

* Sjálvsøkni
* Politiskari líkasælu
* Tilvildarligum og órættvískum/ósakligum stjórnarhátti
* Materialismu
* Upploysn av siðbundnum familjumynstri
* Vónloysi
* Rættarloysi
* Mutri

Eitt samfelag við mutri, sjálvsøkni, materialismu og politiskari líkasælu er eitt samfelag í kaos og upploysn. Uttan varðveitslu av teimum góðu virðunum er samfelagskósin sett ímóti einari kaldari, hjartaleysari og vónleysari støðu. Hetta man ikki fara at vera kósin hjá okkara kæra landi, tí á hesum klettum býr ein stór fjøld av fólki, sum viðurkennir og grundar sína tilveru á tey lívsjáttandi og góðu kristnu virðini. Eg vil virka fyri at verja tey kristnu virðini, tí tey verja okkum.

Vel ein sterkan Miðflokk á ting!

# Fiskavirkisskipanin skal broytast



Val X

EYÐGUNN SAMUELSEN
Javnaðarflokkurin

Ofta hoyrir man um allan "studningin", ið ymiskir bólkar í okkara samfelag fáa og hvussu ræðuligt tað er, at til dømis tey ið arbeiða á flakavirki, fáa 32 tíma viku útgoldna úr ALS, um onki arbeiðið er.

Hvat ein fær úr skipanini hevur altíð verið útrokna, eftir hvat tú hevur forvunni í tíðarskeiðnum áðrenn, og tú fær ongantíð meir enn 90 % av eini arbeiðaraløn. Fyri fáum árum síðan bleiv hetta útrokningargrundarlag fastfryst.

Hetta merkir at flakakvinnur, ið ikki høvdu forvunni nakað serligt áðrenn útrokningargrundarlagi bleiv fastfryst, fáa heilt niður í 12 kr. um tíman. Hvør annar hevði funnið seg í at fingið 32 tíma viku við eini tímaløn á 12 kr ? Hetta gevur eina vikuløn á , haldi tykkum fast, 384 krónur.

Havi eisini tosað við kvinnur, ið hava arbeitt á flakavirki í bæði 20 og 30 ár og teirra tryggjaða tímaløn er 40 og 50 krónir, tí lítið var at forvinna tá ið útrokningargrundarlagi var fastfryst. Havi eisini tosað við eina kvinnu, ið var so "heppin" at hava forvunnið væl tá grundarlagi var fastfryst, so hon hevði onki at klaga um segði hon, tí hon fekk tað hægstu lønina ið er 73 kr. um tíman. Mánaðarlønin hjá einum flakafólki, um tey eru 4 vikur í hesi skipan tí onki arbeiðið er, er undir 10.000 krónir. Og so tosað fólk um hvussu galið tað er at fólk eru tryggaði í fiskavirkisskipanini. Hetta er beinleiðis ómoralskt og ein vanvirðing av teimum ið skapa virðini í samfelagnum.

Javnaðarflokkurin meinar, at vit skulu burtur frá hesi skipan. Ein byrjan kann verða, at innføra rullandi útrokningargrundarlagi aftur, man málið er so avgjørt at heilt taka útrokningargrundarlagi burtur, so øll fáa 90% av eini arbeiðsmannaløn.

Eisini eigur útgjaldið úr ALS at verða eftirlønargevandi, um vit ikki gera tað, so fáa verkafólk ongantíð eina rímuliga eftirløn. Sama er við forsorgarhjálp og øðrum gjøldum, tey skulu øll vera eftirlønargevandi. Og ongin mótrokning skal vera í frítíðarlønini, tí hetta er peningur ið tú hevur forvunnið tær við arbeiðið og hevur goldið skatt av.

Okkara greiða mál er, at flakafólkini skulu hava eina fastlønarskipan. Veit væl at hetta er ein spurningur fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, men vit vilja gera okkara fyri at sannføra partarnar um, at hetta er einasta skilagóða loysnin ikki bara fyri verkafólkini men eisini fyri virkini sjálvi. Lat ongan iva verða leygardagin tá ið tú skal seta krossin, Javnaðarflokkurin er einasti flokkur ið vanligi løntakarin kann líta á. Fái eg møguleikan vil eg gera alt ið eg eri ment ikki at svíkja hetta álit.

# Minni heft at oljuni



Val X

ÓLUVA NICLASEN
Javnaðarflokkurin

Javnarflokkurin arbeiðir fyri at gera Føroyar meiri óheftar av oljuni. Vælferðin er í stóran mun heft at oljuni sum orkukelda; hetta ger okkum sera viðkvom fyri ávirkan uttaneftir og kann hótta bæði samfelagsskipan og ikki minst **umhvørvi**.

**Kvotupeningurin: 10 – 20 mill. - um árið setast av til umhvørvistiltøk**
Føroyar fingu ikki staðfest Kyotosáttmálan um koltvísúrniútlát. Høvdu vit staðfest sáttmálan við teirri útlátsminking, sum Danmarkar ríki hevur átikið sær t.v.s. – 8 %, at galda frá 2008, so kundi verið neyðugt at keypt koltvísúrnukvotu fyri einar 10-20 mill. um árið tey fyrstu árini, um vit ikki vóru før fyri at minka um útlatið so nógv her og nú. Javnaðarflokkurin skjýtur upp, at vit tey næstu árini oyramerkja 20 mill. um árið til verkætlanir, sum veruliga kunnu flyta okkum fram á leið.

**Peningurin skal nýtast til eitt nú:**
- Upplýsandi og ráðgevandi tiltøk, á øllum mótum, til allar bólkar um hvussu vit gagnnýta orkuna betur
- Stimbra royndir við skipanum, sum kunnu minka um oljunýtsluna
- Menning av almennari ferðslu, eitt nú við ókeypis busssambandi
- Gagnnýta avlopsorkuna frá brennistøðum og motorriknum elverkum
- Húsarhaldini eiga at verða upplýst um orkusparandi tiltøk og um, hvussu nógva oljunýtslu pr. fermetur tey eiga at kunna koma niður á.
- Útvega ráðgeving og hagtøl (um orkunýtslu og rakstur annars hjá øllum skipabólkum) til fiskiskip - so avgerðir verða tiknar á røttum grundarlagi. At stimbra nýtslu av stýriskipanum, sum geva reiðarií og manning eitt amboð at fáa betri orkunýtslu. Hetta kann gerast við at ráðgeva og seta skipanum beinleiðis krøv um sparingar og harvið eggja til at minka um óneyðuga orkunýtslu
- Áseta gagnligasta veiðitrýst í mun til fiskastovnarnar
- Útvega orkuhagtøl, sum kunnu gerast eitt stýringsamboð í orkupolitikkinum.
- Stuðul til menning av varandi orkukeldum: vind-, vatn-, sjóvarfalsorku, alduorku og sólorku.

**Hámarksloft fyri útlát**
Neyðugt verður, at finna skipanir fyri, hvussu hámarksloft fyri ymisku bólkarnar kunnu ásetast.

Javnaðarflokkurin gevur umhvørvinum eina rødd.